# Skótabúðin søkir fólk

Ert tú áhugað/ur í náttúruni og hevur handilsprógv, vantar tær starv, so ert tú kanska tann, vit leita eftir.

Sp/f Skótabúðin søkir eftir dagligum leiðara 3/4 tíð at byrja skjótast gjørligt.

Skótabúðin hevur síðani miðskeiðis í 60-unum rikið handil við skóta- og frítíðarútgerð.

**Vit vænta at tú:**
- Ert arbeiðssamur
- Ert røkin
- Ert samarbeiðsvilligur
- Hevur handilsprógv

**Arbeiðið fevnir um:**
- Sølu og kundatænastu
- Keyp av vørum
- Marknaðarføring

Løn sambært S&K.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum skal sendast til

**Sp/f Skótabúðin**
**Hoydalsvegi 6**
**Postsmoga 1080**
**FO-110 Tórshavn**

í seinasta lagi 20. oktober 2003.

Hava tygum spurningar, so setið tygum í samband við Hans Anfinnson Norðfoss á tlf. 224454.

# Keyp av seyðaskinnum

Aftur í ár keypa vit seyðaskinn, men bert um hesi eru saltað og íligin.

Prísurin verður:
Fyri 1. flokks seyðaskinn kr. 22,-
Fyri 2. flokks seyðaskinn kr. 17,-

Hagreiðing skal vera eftir forskriftunum, og skulu skinnini m.a. kølast beinanvegin.

Bert væl hagreidd lambsskinn fáa góðan prís, meðan ær-, veðra- og 2. flokks lambsskinn fáa 2. flokks prís.

Pesjur verða ikki keyptar.

Seinni verður lýst um, nær móttøkan byrjar og hvar hon verður.

Forskriftir um hagreiðing av seyðaskinnum kunnu fáast við at venda sær til MBM á telefon 479035.

*Kollafjørður 2. oktober 2003*

MBM

www.sosialurin.fo

# Til sølu



1 stk. Daewoo diesel trukkur
modell D205-3 · árgang 1999

**SP/F NORÐ TRUKK**
Mykinesgøta 3 · Postrúm 1315
110 Tórshavn
Tlf. 315136 / 215136 · Fax 310931
E-mail: nordtruk@nordtrukk.fo

# Til sølu




1 stk. Linde E-12 el-trukkur
modell 324 · árgang 2003

**SP/F NORÐ TRUKK**
Mykinesgøta 3 · Postrúm 1315
110 Tórshavn
Tlf. 315136 / 215136 · Fax 310931
E-mail: nordtruk@nordtrukk.fo

# Pedagogur ella hjálparfólk

## til Sambýlið í Smærugøtu 29

Innan Trivnaðarmálaráðið og stovnar undir tí, við tænastu inntil víðari á Sambýliunum í Smærugøtu 29, er eitt pedagogstarv leyst at søkja til setan 1. november 2003 ella eftir nærri avtalu.

Starvið er tænastumannastarv, sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Pedagogfelagið, lønt eftir lønarstigunum 24 - 31 eftir lønartalvuni frá mars 2002. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi dagkvøldvaktir umframt døgn-og vikuskiftisarbeiði

Sambýlið er undir uppbyggjan og er heim hjá 5 fólkum við m.a. menningartarni, sosialum- og sálarligum trupulleikum

Dentur verður lagdur á, at tann sum settur verður, er likamliga og sálarliga væl fyri, áhugaður at luttaka í øllum avbjóðingum og opin fyri nýhugsan. Eisini er neyðugt at kunna arbeiða sjálvstøðugt, at samstarva við onnur, umframt at vera førur fyri at taka ábyrgd og avgerðir í tí dagliga arbeiðinum.

Søkir tú nýggjar avbjóðingar og vil verða við til at menna hetta sambýlið saman við okkum, er tað nú tú hevur møguleikan.

Bert fólk sum hevur lokið námsfrøðiligt prógv verður sett í pedagogstarvið. Um ikki útbúgvi fólk verður sett í hetta starv, verður tað sett tíðaravmarkað við fólki við líknandi førleika.

Meiri fæst at vita um starvið við at ringja á telefon 321068 og spyrja eftir Finn Larsen, fyristøðufólki. Umsóknarfreistin er 17. oktober 2003 og skulu umsóknirnar sendast til:

**Sambýlið í Smærugøtu**
Att. Finn Larsen
Smærugøta 29
Fo-100 Tórshavn

# TRUKKSKEIÐ

Byrjar í Havn mánadagin
6. oktober kl. 19.15

Tilmelding á tel 318821 · 218777

Spf. KOYRIKORTIÐ
v/Hans J. Hermansen · Sláettanesgøta 5

# Arbeiðshandskar

til øll endamál - bæði á sjógvi og landi

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

klipp og goym

# Fyrstafloks seyðahegn

**50m X 90cm**
**6 tráðað**
**Yvir og undirtráður 3mm**
**Millumtráður 2,5mm**
**Meskavídd**
**B. 15cm H. 14cm til H. 22cm**
**Galvanisering 240g/m2**

# Einans kr. 375,-

**Fa. H.J. Michelsen. Handan Á 6**
**tlf. 31 44 14 - 21 44 14**



# BYGGIFRØÐINGUR

Søkt verður eftir byggifrøðingi ella teknikara við aðrari viðkomandi útbúgving.

Ert tú áhugaða/ur í avbjóðingum á einari ungari teknistovu í menning, har arbeiðsumstøður og arbeiðsumhvørvi verða sett í hásæti?

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna millum annað um:
- um- og nýprojektering av bygningum
- vega- og anleggsprojektering
- projektgransking
- útbjóðingar
- fakeftirlit og byggileiðslu

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni og vera hugaður at arbeiða sjálvstøðugt við áðurnevndu arbeiðsuppgávum. Royndir innan tekniyrki er ikki nøkur treyt.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða eftir nærri avtalu.

**Umsóknir**
Umsókn við avriti av prógvi, lívsgongdarlýsing (CV) og møguligum viðmælum skal sendast til niðanfyristandandi adressu og vera okkum í hendi í seinasta lagi
20. oktober 2003
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**EM RÁÐGEVING**
RÁÐGEVANDI BYGGIFRØÐINGAR

EM Ráðgeving Sp/F
FO- 512 Norðragøta
Tlf.: 44 19 29 o Fax: 44 19 59
t-postur: emradg@post.olivant.fo

*EM Ráðgeving er ein teknistova, ið heldur til í Norðragøtu. Á teknistovuni starvast í dag tveir byggifrøðingar. Um ein mánaða flytur teknistovan í nýggj størri hølir; hetta fyri at geva pláss fyri tí vaksandi virksemi, sum teknistovan støðugt hevur.*

# Til Sølu



**IVECO 85E21 við 6 tons krana, 3 vegis vippu og hydralikk baklúku. Motorur 210 HK, koyrt 89.000 km.**

**Telefon 312779 ella 212779**

Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingur til A2 føðideildina

Á føðideildini er farloyvisstarv sum sjúkrarøktarfrøðingur leyst til setan skjótast gjørligt ella eftir avtalu og fram til 31. august 2004. Talan er um eitt starv á starvsbrøki 0,6 í kvøld- og náttarvakt.

Føðideildin A2 er ein deild við plássi fyri 12 mammum við børnum, 4 barnakonum og einari neonatalari eind, har vit royna, at hvørt einstaka barnið saman við foreldrum, fær so góða byrjan sum gjørligt í lívinum. Deildin er spennandi við nógvum avbjóðingum, tvørfakligum samstarvi, góðari upplæring, undirvísing, og hon hevur tilrættislagda innleiðsluætlan. Á deildini eru royndir og virknir starvsfelagar.

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- faklig vitan og royndir
- góð samstarvsevni
- fleksibul og kreativ/ur
- røkjuskapur
- hug til tvørfakligt samstarv
- vil søkja mennandi avbjóðingar

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Upplýsingar um starvið:**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sonju Andersen, deildarleiðara, telefon 31 35 40, lokal 102 ella til Ceciliu Vestureið, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal/kallara 499 ella e-post ceci@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 20. oktober 2003 kl. 12.00.

Skivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

# GSM telefonir

Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic

# Tráðleysar

Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast

# Til skip og bátar

NMT 450 - VHF telefonir v.m.

**Storno**
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingur Heilsuatstøðingur

Hesi størv eru leys at søkja á **E3/E2:**

- fast fulltíðar starv sum sjúkrarøktarfrøðingur í skiftandi vaktum til setan 1. november 2003 ella eftir avtalu
- avloysarastarv á starvsbrøki 0,7 sum heilsuatstøðingur í skiftandi vaktum til setan 1. desember 2003 til og við 30. november 2004.

E3 er ein medisinsk deild. Sergreinin á deildini er uppvenjing av sjúklingum við apopleksia cerebri og við dis. sclerosu. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við røktarstarvsfólk, fysioterapeutar, ergoterapeutar og talupædagog. Dentur verður lagdur á gott samstarv við avvarðandi og við primertænastuna.

E2 er ein røktardeild við plássi fyri 10 eldri fólkum. Vit ynskja starvsfelagar við hugi og hegni til at taka sær av eldri fólki. Dentur verður lagdur á góðan moral, etisk virði, positiva menniskjaáskoðan og góð samstarvsevni.

**Vit kunnu bjóða:**
- Góðar og dugnaligar samstarvsfelagar.
- Góða upplæring
- Eitt umhvørvi, har tú kanst gera tína áskoðan galdandi og vera við til at menna sjúkrarøktina

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja tlf 313540 Óluvá Hentze, deildarleiðara, á lokal 216, ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 300, e-post asap@lsh.fo

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 20. oktober 2003 kl. 12.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Óla Arge
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 144, P/F Højgaards Handilsvirkið, 600 Saltangará.
**Viðtøkur broyttar:** 16.08.2003.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Elsebeth Malene Sophie Højgaard, 600 Saltangará.

*Skráseting Føroya tann 2. oktober 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3344, Sp/f SBJ, 460 Norðskáli.
**Viðtøkur broyttar:** 02.09.2003.
**Kapitalur:** Hækking við kr. 50.000,00 til kr. 150.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 50.000,00 við skuldarumskifti til kurs 100.

*Skráseting Føroya tann 2. oktober 2003*

*Kristin Balle*